SUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Sjúkueyðkenni frá eitran av algueiturevni í skeljamati.

Skeljadjórseitran gevur nøkur ymisk eyðkenni, alt eftir hvørja eitran talan er um.

Eitranin kann deilast upp í trý høvuðssløg: Diarré-elvandi skeljadjórseitran, verður stytt DSP (av enska heitinum: Diarrhetic Shellfish Poisoning). Lammandi skeljadjórseitran, verður stytt PSP (av enska heitinum: Paralytic Shellfish Poisoning). Minnisloysi-elvandi skeljadjórseitran, verður stytt ASP (av enska heitinum: Amnesic Shellfish Poisoning).

| | **DSP** | **PSP** | **ASP** |
|---|---|---|---|
| **Tilgerðartíð (Inkubatiónstíð)** | ½ – 4 tímar | Fáar minuttir – fáir tímar | < 24 tímar<br>> 24 tímar |
| **Mild ella fyrstu eitranareyðkenni** | Leyst lív (diarré)<br>Spýggja<br>Búkpína<br>Ørilsi | Skriði og kensluloysi rundan um munnin, sum kann breiða seg til andlit og nakka.<br>Høvuðpína<br>Spýggja<br>Leyst lív (diarré)<br>Prikan í fingrunum. | Eyðkenni innan 24 tímar eru spýggja, leyst lív (diarré) og ørilsi. |
| **Álvarslig ella seinni eitranareyðkenni** | Enn er ikki ávíst, um ávirkan av DSP-eitran í longri tíð kann elva til krabba í maga-tarmskipanini. | Skaðar á nervavevnað, sum kann elva til lammelsi (paralysu). Lammilsi kann elva til brek á andingarleiðini (respirationssvigt), sum innan 2 til 24 tímar kann elva til deyða. | Eftir 24 tímar kann minnisloysi koma, og í álvarsligum tilburðum kann eitranin elva til tungt vitloysi (koma) og/ella deyða. |
| **Longd/Tíðarskeið** | Eyðkennini eru tvígongd (reversible), og ganga yvir av sær sjálvum eftir uml. 3 samdøgur, tó kunnu onkur eftirárin vera. | Við mildum eyðkennum kemur tú heilt fyri teg aftur, men ikki, um talan er um skaða á nervavevnað. | Við mildum eyðkennum kemur tú heilt fult fyri teg aftur, men ikki, um talan er um álvarslig eyðkenni. |
| **Viðgerð** | Eingin kend heilivágsviðgerð. | Andahjálp kann bjarga persónum, sum eru álvarsliga eitraðir.<br>Eingin kend heilivágsviðgerð. | Eingin kend heilivágsviðgerð. |

Umsett úr donskum, www.fvst.dk feb.2021. Málnr.: 21/00601-1

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 556 400**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo